# AR Í 9. HIMLI



*Toppskjúttin í Vodafonedeildini, Christian Høgni Jacobsen, er flúgvandi*
Mynd: Sofus Johannesen



**TAMARHALD Á**
*Jann Ingi Petersen (11) og NSÍ hildu Andrew av Fløtum og HB burtur frá stórvegis málmøguleikum*
Mynd: Sofus Johannesen

á sjálvari málstrikuni fekk ein havnarmaður vart fyri, og so var vandin yvirstaðin.

### Christian Høgni vísti format

Í seinra hálvleiki komu gestirnir betur við í dystin, ikki minst tí HB fekk betur tak á miðvøllinum. Men tað var ein smeitur fyri gestirnar at Andrew av Fløtum mátti av vøllinum stutt eftir steðgin, tí HB hevði sera trupult við at koma til kvalifiseraðar málroyndir.

Sum seinri hálvleiki leið dalaði spælið nakað. Tað var sum um HB kláraði at taka broddin av trýstinum hjá runavíkingum, og vóru við til at mynda dystin, uttan tó at koma fram til nakra vandastøðu.

Men í 80. minutti gjørdi Hans á Lag, sum annars spældi sum ein brandur í verjuni hjá HB, eitt býtt brotspark, sum Christian Høgni umsetti til mál.

Nú skuldu gestirnir fram á vøllin, men ístaðin vóru tað runavíkingar sum í síðsta minutti øktu um leiðsluna, sjálvandi við máli frá Christian Høgna Jacobsen, tá hann sneiddi ein verjuleikarar, áðrenn hann smekkaði bóltin í netið. Eitt klassamál frá Christian Høgna.

Sostatt mátti eisini HB leggja rygg til eitt tap móti formsterku runavíkingunum, so hava skúgvað alla mótstøðu til viks hesi seinastu níggju umførini, og staðfestu sína støðu sum oddalið í Vodafonedeildini.

*post@sosialurin.fo*

## Christian Høgni Jacobsen:

# Vit høvdu munin



– Eg haldi at vit vóru betri enn HB, segði ein fegin Christian Høgni Jacobsen eftir dystin.

Christian Høgni vísir á at NSÍ høvdu fleiri naskar royndir í dystinum, meðan HB ikki kom fram til nakran orduligan kjans.

Spurdur um orsøkina til góðu gongdina hjá runavíkingum, sigur Christian Høgni, at runavíkingar hava eitt sera gott lið, og tá allir mans stríðast fyri hvørjum øðrum, so ber tað langt.

Toppskjúttin í Vodafonedeildini er meira jarðbundin, tá hann skal meta um sítt egna avrik í dystinum.

– Fyrsta málið er so eitt brotspark, meðan tað seinra kemur eftir at eg sleppi leysur og so er bara at smekka til, segði ein fegin tví málskjútti eftir dystin.

## Símun Samuelsen:

# Betra liðið vann



– NSÍ var betra liðið, og vann ein uppibornan sigur, segði ein vónbrotin, men avgjørdur Símun Samuelsen eftir dystin, tá Sosialurin fekk orðið á hann.

– Vit fáa ikki spælið at koyra í dag, og av tí sama koma vit ikki fram til neyðugu kjansirnar, sum skulu til fyri at vinna dystir, segði Símin

Spurdur um hvat trupulleikin er, metir Símun, at tað fyrst og fremst ræður um at fáa glið á egið spæl, so skulu kjansirnir nokk koma.

Hóast HB tapti oddadystin, so vísir Símun á at kappingin er bert komin hálvan veg, og enn er langt á mál.

– Men vit skulu taka okkum saman til næsta dyst, sum verður í Gundadali móti EB/Streymi, sigur Símun Samuelsen avgjørdur.